# Góð undirtøka fyri útferðum

**Føroyingar tíma at gera skipaðar útferðir í egnum landi. Tað er niðurstøðan, eftir at Norðoya Kunningarstova hevur havt tríggjar sera væl eydnaðar útferðir í Norðoyggjum**

FERÐAVINNA
*Eyðun Klakstein*



*Tað eru fyrst og fremst føroyingar, sum hava verið við á útferðunum hjá Norðoya Kunningarstovu, og tað vísir, at tað ber væl til at skipa fyri ferðavinnutilboðum til føroyingar í summarferiuni, heldur Christian Olsen, sum er leiðari á Norðoya Kunningarstovu*

Norðoya Kunningarstova hevur í summar skipað fyri trimum útferðum í Norðoyggjum, og hesar hava eydnast sera væl.

Fyrsta túrin vóru eini 100 fólk við, og tað var helst í meira lagi. Síðani hava eini 100 fólk tilsamans verið til teir báðar seinni túrarnar.

– Tað eru fyrst og fremst føroyingar, sum hava verið við á hesum útferðum, og tað vísir, at tað ber væl til at skipa fyri ferðavinnutilboðum til føroyingar í summarferiuni, sigur Christian Olsen, sum er leiðari á Norðoya Kunningarstovu.

– Undirtøkan til ferðirnar hevur verið sera góð, og tað eru vit væl nøgd við, sigur hann.

### Vitjaðu Blankskála

Seinasta útferðin var farna vikuskiftið, tá 55 fólk gingu til Blankskála á Kalsoynni. Hendan ferðin var útsett eina viku orsaka av veðri, men nú hon varð gjøgnumførd, gekk hon sera væl.

Asbjørn Lómaklett greiddi frá um Blankskála í gomlum døgum, og fólkini kvøddu eisini eina vísu og sungu ein sang á staðnum.

Tað verða ikki gjørdar fleiri útferðir í ár, men hetta summarið vísir, at tað er grundarlag fyri at skipa fyri slíkum ferðum til føroyingar.

### Fleiri vitjandi

Norðoya Kunningarstova hevur havt úr at gera í summar. Frá mars til juli vóru 3200 vitjandi á Kunningarstovuni, og hetta er meira, enn tað hevur verið seinnu árini.

Gistingarhúsini í Norðoyggjum hava eisini havt fleiri vitjandi, enn tey høvdu í fjør, so hóast summarið hevur verið hálvvánaligt, tá hugsað verður um veðrið, so hava nógv ferðafólk vitja norðanfyri í summar.



*– Hóast tilboðini eru nógv av alskyns slagi, og tøknin gerst alt meira umfatandi, so hevur bóksavnið sín leiklut í samfelagnum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík*

# Bókasavnið sett í stand

**Bókasavnið í Klaksvík hevur verið stongt fleiri vikur í summar, tí umvælingar eru gjørdar á bókasavninum**

BÓKASAVN
*Eyðun Klakstein*

Tá bóksasavnið í Klaksvík letur uppaftur í næstum, verður tað neyvan til at kenna aftur. Í summar eru stórar umvælingar gjørdar á bókasavninum, og millum annað eru loft og gólv skift.

– Vit ynskja at hava eitt gott bókasavn í býnum, og tá talið á vitjandi hevur verið vaksandi seinastu tíðina, hava vit hildið tað verða rætt at seta bókasavnið í stand, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Bókasavnið í Klaksvík heldur til á Biskupstøð, og virkar bæði sum alment bókasavn og skúlabókasavn fyri skúlarnar í Klaksvík.

– Hóast tilboðini eru nógv av alskyns slagi, og tøknin gerst alt meira umfatandi, so hevur bóksavnið sín leiklut í samfelagnum, og vaksandi talið á vitjandi ber eisini boð um tað, sigur Steinbjørn Jacobsen.






# Jørgin drívur á

**Jørgin Dahl og hansara fólk í Lost Pilgrims vóna, at okkurt kann spyrja burturúr sambandinum við danskan festivalstjóra**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Jørgin Dahl og bólkur hansara, Lost Pilgrims, ætla at gera vart við seg í Keypmannahavn í heyst.

Bólkurin spældi á Langelandsfestivalinum fyri nøkrum vikum síðani, og hendan framførslan gekk stak væl. Stjórin fyri Langelandsfestivalinum vendi sær av fyrstan tíð til Jørgin og teir og bjóðaðu teir at koma á festivalin.

– Hann hevði hoyrt fløguna hjá okkum, og dámdi hana sera væl. Tað var stuttligt at sleppa við á hendan festivalin uttan at skulu ígjøgnum vanligu mannagongdina við demofløgum og øðrum, sigur Jørgin Dahl.

Sambandið millum Lost Pilgrims og stjóran fyri Langelandsfestivalin er gott, stjórin hevur bjóðað sær at hjálpa Lost Pilgrims við ymiskum í heyst. Hesum vóna Jørgin og hansara menn at okkurt gott kann spyrjast burturúr.

Ætlanin er, at Lost Pilgrims skulu hava eina konsert í Keypmannahavn í september mánaði, og hetta skal verða ein konsert, sum skal sýna bólkin fram millum vanligar lurtarar og fólk, sum hava eitthvørt at siga í fjølmiðlum og innan tónleikaheimin.

### Nýggir sangir

Lost Pilgrims spældu fyri eini trivaligari áhoyrarafjøld á Langelandsfestivalinum, og hetta kvøldið vóru samanlagt 10.000 fólk til festivalin, so her er talan um stórt tónleikatiltak.

– Vit spældu sangir av fløguni hjá okkum, og vit høvdu eisini fimm nýggjar sangir á skránni, sigur Jørgin Dahl.

Hetta eru sangir, sum Jørgin hevur skrivað til bólkin. Tveir av sangunum eru spildurnýggir, meðan tríggir eru slíkir, sum hann hevur funnið fram úr savni sínum og fingið at passa til bólkin.

Teir, sum spæla saman við Jørgin Dahl í Lost Pilgrims, eru tónleikarar, sum hann hevur havt langt samstarv við. Fleiri av teimum spældi hann við av fyrstan tíð, tá hann flutti til Danmarkar miðskeiðis í áttatiárunum.

Teir hava egin venjingarhøli og hava gjørt nógv við venjingarnar seinastu mánaðirnar.

Ætlanin er, at hesar venjingarnar skulu koma til góðar, tá bólkurin skal royna at gera vart við seg í heyst.



*Jørgin Dahl og Lost Pilgrims spældu herfyri á stóra Langelandsfestivalinum, og í september mánaði er ætlanin at hava konsert í Keypmannahavn*



# Dan Klein í rættin fyri ærumeiðing

**Í dag fer blaðstjórin á Oyggjatíðindum í rættin at verja seg móti ákærum um ærumeiðing. Tað er Victor Carlsen, ið hevur stevnt Dan Klein, tí hesin hevur kallað hann “pengagrís” á forsíðuni í blaðnum**

RÆTTARMÁL
*Stefan í Skorini*



*Victor Carlsen finnur seg ikki í at vera kallaður “pengagrís”. Tí hevur hann stevnt blaðstjóranum á Oyggjatíðindum fyri ærumeiðing. Málið kemur fyri í rættinum mikudagin*

Tað var í vár, at tað stóð at lesa í Oyggjatíðindum um Victor Carlsen, og í yvirskrift á forsíðuni varð hann kallaður pengagrísur. Hesum finnur Victor seg ikki í, og hann hevur tí stevnt Dan Klein fyri rættin.

Greinin í Oyggjatíðindum segði frá, at Victor Carlsen hevði sent eina rokning vegna móðir sína til arvingar hjá manninum, sum móðir Victor var gift við. Sambært rokningini kravdi hon pening, fyri at mamman hevði passað mannin, sum hon var gift við, meðan hann var sjúkur. Hesi bæði eru nú deyð. Rokningin varð tó víst aftur sambært blaðnum.

Tí metti blaðið seg hava rætt at kalla mannin fyri pengagrís. Eisini eru aðrar ákærur í greinini, sum ikki sleppa at standa óátalaðar í fyrstu syftu.

Bjørn á Heygum er sakførari hjá Victori Carlsen, og hann sigur, at hetta er ein stevning um ærumeiðing, har høpisleysar atfinningar eru tiknar úr leysum lofti og verða holvdar omanyvir viðkomandi sum ein lortabytta. Tí skal Dan Klein prógva uppháldini í rættinum.

### Dómarin er vitni

Tann ákærdi hevur innkallað at vitni í síni roynd at verja seg. Og tað eru ikki hissini vitni, sum eftir ætlan vera í rættinum.

Politimeistaran Mogens Nepper Christensen, Løgtingsins umboðsmann Joen H. Andreasen og dómaran hevur Dan Klein innkallað sum vitni.

Um Dan verður funnin sekur í ærumeiðing, kann hann vænta sær eina bót uppá 10.000-20.000 krónur, men dómarin hevur eisini heimild at geva fongsulsrevsing.

Lítil ivi er um, at verður Dan Klein funnin sekur, so fer hann at kæra dómin fyri hægri rætt.

Um Dan Klein hinvegin ikki verður funnin sekur, sleppur greinin at standa órørd.

# Kaupthing nøktandi úrslit

**Kaupthing Føroyar, ið er einasta virðisbrævameklarafelag í Føroyum, hevði eitt avlop fyrra hálvár í ár uppá 438.000 krónur**

ROKNSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Roknskapurin hjá Kaupthing fyri fyrra hálvár í ár er gjørdur, og hann vísir eitt avlop á 438.000 krónur. Hetta metir felagið vera nøktandi.

Í tíðindaskrivi sigur Kaupthing, at tað hevur verið kostnaðarmikið at fara undir virksemi í Føroyum, og tí er tað óvæntað, at raksturin longur vísir eitt avlop. Felagið væntar, at seinna hálvár fer at roynast betur enn fyrra.

Kaupthing Føroyar fekk loyvi frá danska fíggjareftirlitinum at reka virðisbrævameklaravirksemi hin 28. februar 2001, so roknskapurin fyri farna hálvár vísir í veruleikanum raksturin frá 1. mars 2001 til 30. juni.

Úrslitið av fíggjarpostum gjørdist nærum fýra milliónir krónur, meðan útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 3,4 milliónir krónur.

Kaupthing Føroyar hevði hin 30. juni í ár eina eginogn uppá 10,7 milliónir krónur.



*Kaupthing Føroyar hevði eitt avlop uppá 438.000 krónur fyrra hálvár, og tað er stjórin Peter Holm væl nøgdur við*

## Rækjuprísurin í botni

RÆKJUPRÍSUR
*Rólant W. Dam*

Prísurin á rækjunum er sera lágur í løtuni. Ein av orsøkunum til hetta er, at tað hava verið sera nógvar rækjur á marknaðinum seinastu tíðina.

Prísurin á ídnaðarrækjum hevur ligið um kr. 2,50, og er hetta undir miðal hesa tíð á árinum, sigur Sofus Poulsen stjóri á rækjuvirkinum á Oyri.

Í september plagar prísurin at fara eitt sindur upp eftir, og Sofus Poulsen vónar at hetta hendir. Undir øllum umstøðum skuldi prísurin fari upp um jóltíðir, tí tá er eftirspurningurin niðri í Evropa so stórur.

## Delta flytir í nýggj høli

FLYTING

Elektroniktænastan Delta flytir nú í húsini, sum vanliga eru nevnd Knútsstova og Hotel Djurhuus í Gongini.

Eftir at hava verið í leigaum hølum seinastu átta árini, fer Delta nú í egin hús, sum liggja yvir av Essaba ella Café Natúr.

Tey gomlu húsini eru um at vera liðugt umvæld, og eigarin Brandur í Dali væntar, at handilin letur upp í nýggju hølunum um ein lítlan mánað.

Handilin í J. Paturssonargøtu letur aftur í morgin, hósdagin, men verkstaðið verður væntandi bara stongt eina viku.